# Hann veit, hvat gongur fyri seg við bryggjukantin og úti á havleiðunum

**Tað er áhugavert at tosa við fólk, sum vita, hvat tey tosa um, tí tey sita so nær "hjartanum" í vinnuni - ella tí partinum av vinnuni, sum er teirra øki.**
**Ein slíkur maður er Poul Huus, sum starvast hjá Havsbrún í Fuglafirði**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Ført tú fatur á Poul, veit hann, hvat tey flestu skipini gera, sum samskifta við Havsbrún. Hann tosar regluliga við tey úti á fiskifeltinum og veit tískil, hvar tey eru, hvat tey gera, hvat tey fáa, og hvussu gongdin er annars.

Kemur eitt útlendskt skip á Fuglafjørð at "venda" ávegis til fiskiskap, so dugir Poul at meta um, hvat skipið hevur gjørt á Fuglafirði, og hvar leiðin ber. Hevur skipið tilknýti til Vónina, so veit Vónin sjálvsagt ítøkiliga, um skipið hevur verið við nót eftir ella eftir nót - ella bæði. Hinvegin veit Poul eitt sindur um at kalla "alt" sum fyriferst við bryggjukantin niðanfyri Havsbrún - og úti á havleiðunum, har skipini royna.



*Danski báturin, Gitte Henning, lá á Fuglafirði fríggjadagin, tá ið Sosialurin datt fram við.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## Gitte Henning, Murman og Norðbúgvin

Fríggjadagin, tá ið Sosialurin var í Fuglafirði, lá danski báturin, Gitte Henning, við bryggju.

- Gitte Henning er heimahoyrandi í Thyborøn. Skipið hevur ikki landað til Havsbrún á hesum sinni. Teir hava helst lagt at her ávegis til Grønlands á lodnuveiði, har aðrir danskir bátar eru farnir, eitt nú Ruth, sum eisini var á Fuglafiðri í síðstu viku, sigur Poul Huus.

Hann vísir á, at Gitte Henning, sum vanliga fiskar við troli, av og á hevur landað í Fuglafirði; tá hevur hann verið við svartkjafti.

- Nú sleppa donsk skip ikki at fiska svartkjaft í føroyskum sjógvi, tí vit hava onga avtalu við ES um svartkjaftin. Áður hevur skipið landað svartkjaft til Havsbrún úr føroyskum og norskum sjógvi.

Poul sigur, at ein russiskur bátur, Murman II, var á Fuglafirði sunnudagin við 1200 tonsum av svartkjafti, sum teir høvdu fingið í altjóða sjógvi norðanfyri.

Norðbúgvin, sum Bjarti Mohr eigur, hevur eisini verið við einum sjatti, 100 tonsum av svartkjafti.

- Norðbúgvin fiskar annars nebbasild í Norðsjónum. Nú komu teir eftir einum troli frá Vónini og skulu í norskan sjógv at fiska svartkjaft.

Hann vísir á, at ídnaðarskipini hava eina svartkjaftakvotu, sum skal landast til matna, men í hesum førinum royndi Norðbúgvin í Norðsjónum - og tá kunnu teir landa veiðina til ídnað, sum teir gjørdu í hesum førinum.

## 300 tons um døgnið

Poul Huus veit annars at siga, at Finnur Fríði er á sild, Jón Sigurðsson á bedding í Íslandi, og Saksaberg er á lodnuveiði í íslendskum sjógvi.

Krúnborg, Christian í Grótinum, Tróndur í Gøtu og Jupiter eru allir á svartkjaftaveiði. Teir royna í føroyskum sjógvi norðanfyri, norður ímóti íslendska fiskimarkinum.

- Svartkjaftaskipini fáa eitt sindur, eini 300 tons um dagin. Tað er ikki so lítið, men heldur ikki nógv í mun til, tá ið fiskiskapurin er góður, sigur Poul Huus, sum væntar, at okkurt av svartkjaftaskipunum kemur inn at landa í vikuni.

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!



# LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

## Akfør

**FORD SIERRA 2.0**
árg. 91, til sølu. Nýsýnaður, sær gott út og í góðum standi.
*Tlf. 373288 ella 254079*

**HAYNES**
Owners Workshop Manual, Ford Fiesta 1976-1980, all models, 957cc, 1117cc, 1298cc" - til sølu.
*Tlf. 442181*

**OPEL CALIBRA**
Svartur Opel Calibra 2.0i, árg. 91 við 140 Hk til sølu. Bilurin hevur m.a sóltak og sportsfelgur v.m. Stórt anlegg kann fylgja við um ynskist. Áhugaðringið
*212740*

**MERCEDES BENC 300 TD**
7 setur, powerstýring, sóltak, krók til sølu við píkadekkum.
*Tlf. 224910*

**DIESELBILUR TIL SØLU**
Seat Cordoba Stc. 1.0, árg. 05/2000. Koyrt 50.300 km. Til sølu vegna keyp av øðrum bili.
*Tlf. 310924*

**EYKALUTIR**
til Toyota HiAce, árg. 88 til sølu. Dømi: forrútur, f/kúf., forlyktir, viskaramekanisma o.a.
*Tlf. 423572 ella 210560*

**VW**
bobla til sølu fyri 5.000 kr. Krevur ábøtur. Spildurnýggjar sportsfelgur og 15" dekk til sølu fyri einans 5.500 kr. passa til Peugeot og Citroen.
*Tlf. 255363*

**CITROEN ZX 1.9**
diesel, árg. 92, til sølu fyri 33.000 kr. Nýsýnaður.
*Tlf. 315594*

**TIL SØLU**
Fýra dekk til sølu, óbrúkt. Stødd 185/65-14.
*Tlf. 215111*

**TOYOTA CARINA II**
árg. 87, 1.6 aut. gear, bíliga til sølu.
*Tlf. 264574 ella 421057*

**TOYOTA COROLLA 1.6 XL**
árg. 88, til sølu fyri 12.000 kr.
*Tlf. 321507 eftir kl. 18*

**VW PASSAT 1.9 TDI**
árg. des. 98 til sølu fyri 160.000 kr. við fylgja 16" sportsfelgur.
*Tlf. 422018*

**MAZDA 323**
frá okt. 86 og nakað av eykalutum til sølu fyri 5.000 kr.
*Tlf. 449455 ella 262324*

**TIL SØLU**
Citroen B X 19 X B, árg. 87 til sølu fyri 5.000 kr.
*Tlf. 227777*

**TIL SØLU**
Mazda 626, árg. 87, koyrt 180.000 km., sýnaður 2001, ongan x - møguliga gamal bilur kann ganga inn í keypi. Prísin kunnu vit tosa um.
*Tlf. 228347*

**TIL SØLU**
Daihatsu Charade G 100, árg. 89, koyrt 118.000 km., sýnaður 3/02, ongan x - møguliga gamal bilur kann ganga inn í keypi til sølu fyri uml. 18.000 kr.
*Tlf. 228347*

**MAZDA 323 1,5 SEDAN**
Leitar tú eftir einum góðum og bíligum bili? Ein Mazda 323, árg 1996, koyrt 125.000 km, spildurnýggj heilársdekk til sølu. Anlegg fylgir við. Bilurin er í Eysturoynni.
*Tlf. 227844*

**TOYOTA COROLLA 1,6 GTI**
Bilurin sær sera gott út, er hvítur, senkaður, 15'' OZ Polaris sportsfelgur og tuningspott, árg. 88, nýlakeraður.
*Tlf. 220891*

**DEKK**
Fýra óbrúkt, nýggj, 195/55-15, Continental dekk til sølu fyri 3.000 kr. Nýprísur 4.000 kr.
*Tlf. 253371*

**TOYOTA CARINA E 1,6**
árg. okt. 92, í góðum standi, bíliga til sølu.
*Tlf. 226762*

**4 NÝGGJ SUMMARDEKK**
av merkinum Michelin, 195/65 R 15, bíliga til sølu.
*Tlf. 226364*

**VOLVO VI**
við sportsfelgum, bíliga til sølu.
*Tlf. 444454*

**VW GOLF GL TDI**
árg. 94, til sølu.
*Tlf. 443164, e. kl. 18*

**MITSUBISHI GALANT 2.0**
GLS, aut. gear, árg. 88, nýsýnaður, til sølu fyri 15.000 kr.
*Tlf. 213340*

## Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
*(set X)* undir teiginum:

| | | |
|---|---|---|
| ❑ Akfør | ❑ Amboð | ❑ Arbeiði |
| ❑ Barnaansing | ❑ Barnaútgerð | ❑ Bátaútgerð |
| ❑ Bingo | ❑ Brævaskifti | ❑ Burturm./funnið |
| ❑ Býli | ❑ Bøkur | ❑ Dansur |
| ❑ Dýr | ❑ Fundir | ❑ Húsarhaldstól |
| ❑ Innbúgv | ❑ Lutaseðlar | ❑ Leikur |
| ❑ Matur | ❑ Pløgg | ❑ Samband |
| ❑ Súklur | ❑ Teldur | ❑ Tónleikur |
| ❑ Út-& sjónvarp | ❑ Ymiskt | ❑ ......................... |

***Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. T.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.***

Sent hevur:
Navn:............................................
Bústaður:........................................
Bygd/býur:.......................................
Tlf.: ............

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki

## Amboð

**BORÐSAG**
220/380 V 2.2 kw, 20 m tekniskur kápil til sølu fyri 2.900 kr.
*Tlf. 0045 20944405 ella 264934*

**TIL SØLU**
Motorsveisianlegg til sølu. Hevur eisini 220 V útgang.
*Tlf. 317414 - 226315*

**VIÐFESTISVOGNUR**
Variant, stødd: 150 x 100 x 40 cm, fermir 400 kg., 2-ára gamal, væl viðfarin og lítið brúktur, til sølu við tremmukassa úr impregneraðum timbri.
*Tlf. 219515*

## Arbeiði

**ARBEIÐI YNSKIST**
Hevur tú nakað arbeiði til mín, so ring á
*tlf. 361452 - 264537, e. kl. 21*

**ÁSEYÐAROYTING**
New Zealendarin kemur nú aftur til landið. Roytt verður frá 01/07 og uml. 3 vikur fram. Áhugað kunnu seta seg samband við okkum. Jóannes Patursson, tel 218089 / 328089
*e-mail j-pat@post.olivant.fo*

## Barnaansing

**HEY HEY!**
Eg eri ein sera fitt 2 ára gomul genta, sum eiti Annika. Er nakar, sum kundi hugsað sær at ansa eftir mær, meðan mamma og pápi eru til arbeiðis?
*Tlf. 312703*

**BARNAANSING/HÚSHJÁLP**
Vit søkja eina unga gentu, sum kundi hugsa sær at verið húshjálp i Danmark, og passa tvey børn í aldrinum 6 og 9 ár. Start 1. september.
*Tlf.: 0045 76968085*

**VIT LEITA**
eftir kvinnu at ansa 2 ára gomlum drongi gerandisdagar frá 15. august.
*Tlf. 314740*

## Barnaútgerð

**BARNAVOGNUR**
Scandia, ljósagráur. Tilhoyr: Madrassa og babylift v/madrassu. Í sera góðum standi. Prísuppskot kr. 800,-
*Telefon nr. 265519*

**TIL SØLU**
Barnastólur at festa á súkklu - sær út sum nýggjur.
*Tlf. 313031 eftir kl. 18*

**TIL SØLU**
Madrassa til tremmusong 55x115, ongantíð brúkt, keypt í Skemmuni, til sølu fyri 80 kr. Áhugað vinarliga ring
*Tlf. 224012 eftir kl. 18*

**TIL SØLU**
Madrassa til pusliborð, brúkt til 1 barn, keypt í Skemmuni, til sølu fyri 50 kr. Áhuga vinarliga ring
*Tlf. 224012 eftir kl. 18*

**BILSTÓLUR TIL SØLU**
Ein Chicco bilstólur 0-13 kg, bert brúktur til 1 barn, til sølu fyri 400 kr. Nýprísur 800 kr. Áhuga vinarliga ring
*Tlf. 224012 eftir kl. 18*

**TIL SØLU**
Barnavognur, bert brúktur til 1 barn, keyptur í Skemmuni, til sølu fyri 1.600 kr., babylift og puslitaska fylgir við. Áhugað vinarliga ring
*Tlf. 224012 eftir kl. 18*

**VOGNUR TIL SØLU**
Ein grønur Silver Cross vognur til sølu.
*Tlf. 319888*

**KOMBIVOGNUR TIL SØLU**
Ein svartur Simo kombivognur, við lufthjólum, til sølu. Við vogninum er: lift, madrassa, koyriposi, flugunet, regnslag, barnaselar, luftpumpa og eyka hjól. Vognurin er 15 mánaðir gamal og er bert nýttur til eitt barn. Vognurin hevur regulerbart handtak og er væl viðfarin. Nærri fæst at vita við at ringja:
*tlf. 321064 ella 220284*

**TIL SØLU**
Bilstólur, Maxi Cosi, 0-10 kg. Skrástólur. Systkinasetur at seta á vogn og Baby Dan kenguruposi.
*Tlf. 314797, e. kl. 19*

## Bátaútgerð

**SØKT VERÐUR**
Søkt verður eftir einum manni, til at dríva ein útróðrarbát við egningamaskinu.
*Ring 221017 ella 286361*

**BÁTUR TIL SØLU**
Ein vælútgjørdur glastrevjabátur »Hvalvík 900« 30 føtur við fiskiloyvi til sølu um hóskandi boð fæst.
*Tlf. 224496 ella 457860*

**NEYST ELLA NEYSTAGRUND**
í Sundalagnum ynskist til keyps. Vinarliga ringið á
*tlf. 319871 ella 226271*

**BÁTAMOTORUR**
2 Volvo Penta MD17-36 HK bátamotorar – annar í góðum standi – við stevnurøri, skrúu o.ø. til sølu fyri 12.000 kr.
*Tlf. 215222*

**BÁTUR YNSKIST**
AWI 27 ella líknandi bátur ynkist til keyps.
*Tlf. 252190*

**MOTORUR YNSKIST**
Brúktur Yanmar Diesel typa 4JHE stødd 40/44 HK ella størri 50/55 HK ynskist til keyps fyri ein sámuligan prís. Ring til Oskar
*Tlf. 327039 ella 251834*

**ÍSLANDSRULLA**
Brúkt Íslandsrulla við slisku til sølu.
*Tlf. 447616*

**BÁTAMOTORUR**
Volvo Penta MTD 61 306 HK til sølu.
*Tlf. 447616*

## Bingo

**GOTT BINGO**
verður í Róðrarneystinum á Argjum 11. juli kl. 19.00. Nógvir góðir vinningar. Á lutaseðli ein hjólbøra full av mati. 15 plátur 100 kr. Millumspøl. Eyka spæl. Koyring heim. Øll eru hjartaliga vælkomin.
*AB-stuðlar*

**BINGO**
verður í Felagslonini í Fuglafirði hóskvøldið 4. juli kl. 19.30.
*Eldrafelagið Borgin*

**TVØROYRAR KLUBBI**
Bingo verður í Tvøroyrar Klubba tórskvøldið 4. juli kl. 19.30.
*Nevndin*

## Brævaskifti

**BRÆVASAMBAND YNSKIST**
I am a Swedish boy who would like to have faroese correspondance. Or penpals if you like.
Christoffer Hæger,
Högerudsgatan 5,
SE-216 18 Limhamn, Sweden

## Burturm. /funnið

**FUNNIÐ**
Eitt dreingjaur við motorsúkklu á urskivuni og svartari reim funnið frammi við Sandá fyri uml. einum mánaði síðani. Tann, ið saknar urið, vinarliga ring
*tlf. 316681*

## Býli

**KAMAR YNSKIST Í HAVN**
Kamar við atgongd til brúsu ynskist. Royki og drekki ikki.
*Tlf. 361452 - 264537, e. kl. 21*

**KAMAR/ÍBÚÐ YNSKIST**
Maður søkir kamar ella íbúð í Tórshavn.
*Tlf. 262268*

**ÍBÚÐ YNSKIST**
Vit eru eitt par mitt í 20 unum, ið ynskja eina íbúð skjótast gjørligt. Bæði hava fast arbeiði.
*Tlf. 257868 / 221176 / 314720*

**SKRIVSTOVUHØLI**
til leigu í miðbýnum. 190 fermetrar. Skriva til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn,
*Bill. mrk. 1318-2*

**SUMMAR Í KEYPMANNAHAVN**
Íbúð til 2 pers. til framleigan á Oyrasundskollegiinum í tíðarskeiðnum 27.07.–11.08. 10 min. til strond, sentrum og gott buss samband.
*Tlf. 45 32 88 68 28*

**ÍBÚÐ TIL LEIGU**
90 fermetrar stór íbúð í Hoyvík til leigu fyri 7.500 kr. um mðr. + ljós og hita.
*Tlf. 321224*

**SUMMARFRÍ MITT Í KBH.**
3 ver. íbúð til leigu. 10 min. frá Ráðhúspl., tivoli, 10 min. við bussi til strondina. Sovipláss til trý vaksin, tvey børn, eitt pinkubarn + evt. eykamadrassur. Tíðarskeið 6. juli til 13. juli og 22. juli til 5. aug.
*Tlf. 004532549391 ella 317554*

**ÍBÚÐ ELLA HÚS**
Er nakar, ið hevur eini hús ella eina íbúð til leigu í Streymoynni? Vit eru eitt par við einum barni.
*Tlf. 224394*

**ÍBÚÐ Í KHB.**
3 rúms íbúð á Oyrasundskollegiinum til leigu ì tíðarskeiðinum 7.juli - 5.aug. fyri 1.200 kr. um vikuna.
*Ring á tlf. 32886787 ella 26645196*

**BÝLI YNSKIST**
Vegna norska musikklærarafamilju – foreldur og 5 børn – søkir Tórshavnar Musikkskúli hús til leigu í Tórshavn ella nærhendis fyri ein rímiligan prís.
*Tlf. 313217*

**ÍBÚÐ YNSKIST**
Mamma við 2 børnum ynskir íbúð í Havn skjótast møguligt. Gjalda rættstundis og fara væl um. Vinarliga ring á
*tlf. 311562 ella 254422*

**ÍBÚÐ/KAMAR Í KBH.**
25 ára gamal maður søkir íbúð/kamar í Keypmannahavn/-Amager í tíðarskeiðnum aug./des. royki og drekki ikki.
*Tlf. 254786 ella 313303*

**ÍBÚÐ ELLA KAMAR YNSKIST**
Ungur maður 25 ár, søkir eftir lítlari íbúð ella kamari í Havn ella nærhendis, frá hálvum aug. Farið væl um og royki ikki.
*Tlf. 371032, arb. Andras, tlf. 371152 eftir kl. 16*

**ÍBÚÐ YNSKIST Í ODENSE**
íbuð ynskjast i Odense sum skjotast. Tlf. 0045 21493898
*e-mail: ingvar_eiriksson@hotmail.com*

**ÍBÚÐ**
í Keypmannahavn til leigu til friðarlig fólk í viku 29, 30 og 31. Íbúðin liggur 10.min. gongd frá Nørrebro station.Gott bussamband til miðbýin.
*Tlf. 38107032 mob.22634353*

**FERÐIST Í ELDUVÍK**
Hús til leigu fyri styttri tíðarskeið.
*Tlf. 315638 ella 257383. Best eftir arbeiðstíð*

**ÍBÚÐ TIL LEIGU**
Partvís møbleráð íbúð í Havn til leigu beinanvegin í uml. 3 mán. 5.000 kr. við ljós og hita. 2 mán. leiga forút krevst. Viðmerk tlf.nr. Skriva til Sosialin, Box 76, FO-110 Tórshavn
*Bill.mrk. 258*

**ÍBÚÐ YNSKIST**
Íbúð ella stórt kamar í Havn ynskist til unga mammu. Eg og sonurin eru í íbúðarneyð. Vinarliga hjálpi okkum.
*Tlf. 224012 eftir kl. 18*

**UMBÝTING**
Er onkur, ið flytir heim úr Næstved og manglar bústað. Vit hava hús í Tórshavn og ynskja íbúð/hús í Næstved frá 012.08.02.
*Tlf. 317936*

**FERÐIST Í NÓLSOY**
Hús til leigu fyri stytri tíðarskeið.
*Tlf. 317691/257383 best eftir arbeiðstíð*